# Greiðar ætlanir

## skapa góðan trivnað



# Valskrá
## kommunuvalið 2024

Okkara valskrá er kjølfest í framburði og samanhaldi. Vit vilja tryggja eitt virkið og trygt nærumhvørvi í bý og bygd. Kommunan er til fyri borgaran, og saman vilja vit skapa karmar, har øll kunnu trívast.

Vit ynskja at bøta um grundleggjandi vælferðartænastur, økja um vinnumøguleikar, raðfesta náttúru og skapa góð frítíðartilboð til ung sum gomul.

Við at økja um útboðið av góðum og fjøltáttaðum bústøðum, verða seglini sett fyri at loysa bústaðartrupulleikan í kommununi.

Saman taka vit fetini ímóti einum betri gerandisdegi fyri okkum øll.

## Rætt og ráð til ein góðan bústað

Øll skulu hava rætt til ein góðan bústað og eitt trygt heim, sum ber til at gjalda við vanligari inntøku. Tórshavnar kommuna skal ganga undan at skipa ein fjølbroyttan bústaðarmarknað, har fólk kunnu fáa tak yvir høvdið, sum hóskar til teirra lívsstøðu og fíggjarorku.

Burðardygg býarskipan skal taka atlit til náttúru og trivna. Kommunan skal aftur skipa býlingar, sum leggja upp til felagsskap, og har íbúgvar í øllum aldri og samfelagsbólkum kunnu trívast saman.

### Raðfestingar

- Fjølbroyttir og munagóði bústaðarmøguleikar skulu útvegast í allar kommununi. Stykkjað verður út til raðhús, tvíhús, íbúðir, lutaíbúðir og sethús.
- Almannagagnligt bústaðarfelag skal setast á stovn, har kommunan útvegar minst 200 góðar leigubústaðir fyri ein lágan kostna.
- Lestraríbúðir skulu byggjast til næmingar á miðnámi, yrkisútbúgvingum og Fróðskaparsetrinum.
- Minst 200 fjølbroyttir eldrabústaðir skulu byggjast í allari kommununi.

- Nýggjar býar- og byggisamtyktir, fyri hvønn býarpart og hvørja bygd sær, skulu tryggja, at trivnaðurin stendur fremst í allari bygging.
- Føroysk byggilist, náttúra og mentan skal virðast í allari bygging.

## Hvat høvdu børnini valt, um tey høvdu valrætt?

Dagstovnarnir eru avgerandi fyri menningina av okkara børnum. Námsfrøðið er treyt fyri góðum dagstovnum. Glað starvsfólk - sum hava tíð og fakkunnleika – eru fortreyt fyri, at børnini trívast.

### Raðfestingar

- Játtanin til dagsstovnarnar skal hækkast við minst 40 mió. kr. fyri valskeiðið, tað er 10 mió. um árið í 2025-2028.
- Tímagrunnurin skal hava størri játtan, so børn við serligum tørvi fáa skjóta og fakliga hjálp.
- Vit skulu hugsa smærri barnabólkar í langtíðarætlanini fyri ansingarøkið.
- Eldru dagstovnar skulu dagførast innan og uttan, og allir dagstovnar skulu viðlíkahaldast.
- Størri gjøgnumskygni í normeringini. Køkstímar og leiðslutímar skulu ikki trekkjast frá játtanini til børnini.
- Kommunal viðbót skal veitast til roynd starvsfólk, t.d. 5, 10 og 20 ára viðbøtur.
- Eftirútbúgving og førleikamenning fyri námsfrøðingar og hjálparfólk skal raðfestast.
- Hjálparfólk skulu eggjast at útbúgva seg innan námsfrøði.
- Leiðslan á dagstovnunum hava fakliga útbúgving og eiga tí at hava størri sjálvræði.
- Eindarleiðslan skal endurskoðast og umskipast til eina meira fakliga ráðgevingar-funktión.
- Dagstovna- og skúlaøkið skal frameftir vera ein politisk nevnd burturav og ikki liggja undir mentanarnevndini.

- Børn og ung í Tórshavnar kommunu skulu hava javnbjóðis og góða atgongd til heilsugóðan mat í skúlum og barnagørðum. Ein matarskipan kann stuðla undir trivnað og innlæring hjá børnum og ungum. Hetta stuðlar samstundis undir staðbundnari matframleiðslu.

- Hoyvíkar skúli skal dagførast.

- Tilboðini á frítíðarskúlunum skulu áhaldandi mennast og gerast betri.

# Góð, virkin og virðilig eldraár

Í Tórshavnar kommunu skal tað vera gott at gerast eldri. Vit eru øll ymisk, so tilboð og tænastur skulu tillagast tørvin hjá tí einstaka, og fyrilit skal takast fyri sjálvsavgerðarrættinum hjá borgaranum.

Eldri borgarar í kommununi eru eitt tilfeingi og skulu kunna vera virkin á arbeiðsmarknaðinum, so leingi hugur og møguleiki er til tess. Góð tilboð um venjing og frítíðarvirksemi fyribyrgja einsemi og eru góð bæði fyri sinn og skinn.

Okkara dugnaligu starvsfólk á eldraøkinum skulu trívast og mennast. Vit vísa teimum álit, geva teimum ábyrgd og skapa bestu karmar, so tey gleðast um at fara til arbeiðis hvønn dag.

Heimið er annað og meira enn fýra veggir og tak yvir høvdið. Tað er ein kensla av tryggleika, samleika og sjálvræði.

Heilsa og trivnaður eru fortreytir fyri at vera virkin alt lívið.

## Raðfestingar

- Vit skulu kunna búgva í egnum heimi sum longst.

- Eldravinarligir bústaðir skulu byggjast, so møguligt skiftið frá egnum húsum til røktarheim verður so lagaligt og skynsamt sum gjørligt.

- Vit skulu tryggja eina góða heimatænastu, sum er tillagað tørvin hjá tí einstaka.

- Fleiri ellis- og røktarheimspláss skulu byggjast, samstundis sum verandi ellis- og røktarheim verða dagførd og umvæld.

- Frítíðar- og venjingartilboð til okkara eldru skulu skipast í allari kommununi.

- Bráðtørvspláss og umlættingarpláss skulu altíð vera tøk, um tørvur er á teimum.

- Uppvenjingartilboð skulu veitast.

- Starvsfólkini skulu í størri mun fá ábyrgd av at skipa sítt arbeiði innan givnu karmar.

- Kommunan skal í samstarvi við landsmyndugleikan fáa skipaðar útbúgvingar á heilsu- og umsorganararøkinum.

- Eftirútbúgving og førleikamenning fyri øll starvsfólk skal raðfestast, so fakligheitin gerst enn størri

- Vit vilja fremja inklusjón og javnstøðu á eldraøkinum, tí skulu arbeiðsplássini innrættast, so ongin verður útihýstur. T.d skulu skiftingarrúm vera til bæði menn og kvinnur á arbeiðsplássinum.

## Fíggjarviðurskifti

Fíggjarpolitikkurin hjá Tjóðveldi í Tórshavnar býráð byggir á samhaldsfesti og fíggjarligt skynsemi.

Orka skal leggjast í at fáa tamarhald á skuldini hjá Tórshavnar Kommunu, soleiðis at kommunan sleppur undan at brúka skattin til rentur. Tað er umráðandi, at kommunan ger langtíðarætlanir.

Við langtíðarætlanum og útbjóðing av verkætlanum tryggja vit, at borgarin fær sum mest fyri pengarnar. Hetta ger somuleiðis, at gjøgnumskygni aftur fer at valda á íløgusíðuni. Samstundis tryggjar hetta, at íløgurnar eru væl fyrireikaðar, og at lógir, reglur og mannagongdir verða virdar og fylgdar.

### Raðfestingar

- Tórshavnar kommuna skal gera langtíðarætlanir, sum tryggja, at íløgur verða gjørdar skynsamt.

- Reglurnar fyri útbjóðing skulu fylgjast.

## Føroyskt mál, mentan og list

Tórshavnar kommuna skal áhaldandi ganga fremst at menna mentan, list og føroyska málið. Frá dagstovnum og skúlum, til umstøðurnar hjá menta- og listafólki, til mentan og list í almenna rúminum, til søvn og mentanararv.

## Raðfestingar

- Øll børn og ung í kommuni skulu hava eitt frítíðarkort til at velja frítíðartilboð eftir egnum ynski.
- Játtan skal vera til, at øll børn og ung í kommununi, ið ynskja tað, sleppa framat tónleiki í barnagørðum, skúlum og Musikkskúlanum.
- Tilboð um tónleikaundirvísing skal fáast til vega á øllum plássum í kommununi.
- Rørslu- og mentanardepil skal gerast á Bacalao, har myndlist, tónleikastudio o.a. verður hýst saman við smærri ítróttargreinum.
- Ein langtíðarætlan skal gerast fyri Vestara Bryggju, har bryggjan m.a. verður betur knýtt saman við miðbýnum.
- Haldast skal fram við at útvega góð arbeiðshølir og umstøður til listafólk, venjingarhølir til tónleikarar v.m.
- Tórshavnar Býarsavn, Býarbókasavnið, Sjósavnið og Listasavn Føroya skulu hava størri stuðul frá kommununi.
- List í almenna rúminum og í kommunalum bygningum skal styrkja fjølbroytta list og listafólk, harundir samtíðarlist og ung listafólk.
- Filmslist-, tónleikur, leiklist, ritlist, og málningalist skulu stuðlast beinleiðis frá kommununi – m.a. við at bíleggja verk, konsertir, framførslur og framsýningar langt fram í tíðina, so listafólk hava tryggari inntøkugrundarlag.
- Ætlan skal gerast fyri Hoydalar í samráð við LISA.
- Tjóðpallurin skal fáast aftur á kós í góðum samstarvi við landið, leiklistaøkið og vinnuna.

# Ítróttur og frítíðartilboð

Tað sjálvbodna arbeiðið í ítróttar- og frítíðarfeløgum er bulurin í trivnaðinum í kommununi. Vit vilja stuðla og menna umstøðurnar hjá fólki at virka saman og venja. Játtan skal vera til, at øll børn og ung í kommununi, ið ynskja tað, sleppa at vera í einum felagskapi í frítíðini.

## Raðfestingar

- Øll børn og ung í kommununi skulu hava eitt frítíðarkort til at velja ítróttartilboð eftir egnum ynski.
- Frælsi ítrótturin skal hava betri umstøður. Ljósviðurskiftini skulu fáast í rætt lag. Ein innandura høll til frælsan ítrótt skal fáast inn í íløguætlanina.
- Badmintonhøllin skal dagførast.
- Tær "smærru ítróttargreinarnar" – so sum judo, borðtennis, ríðing, súkkling og boga-skjóting - skulu hava góðar umstøður.
- Bøtast skal um dyppiumstøðurnar á øllum plássum í kommununi.
- Umstøðurnar runt fótbóltsvøllin í Hoyvík skulu fáast í rætt lag.
- Høllin á Argjum og Høllin á Fløtum skulu vera opnar og atkomuligar.

# Tórshavn er ein vinnukommuna

Tórshavnar kommuna er ein blómandi vinnukommuna við sera fjølbroyttari vinnu, sum skapar inntøkur og frambrot til alt landið.

Vit vilja, at kommunan støðugt rekur ein virknan vinnulívspolitikk, sum bæði tryggjar umstøður til tær verandi vinnurnar, og sum stuðlar og eggjar til íverksetan og nýskapan.

## Raðfestingar

- Nýggj vinnuøkir skulu útvegast í kommununi.
- Landbúnaður og landbúnaðarøkini skulu tryggjast í byggisamtyktum og planlegging.
- Hugskotið og íverksetaraátøkini skulu styrkjast munandi. Íverksetarar skulu fáa betri umstøður at arbeiða. Hugskotið skal støðugt veita verksetum góðar karmar, har rúm er fyri íblástri, nýhugsan og nýskapan.
- Ferðavinna, matstovuvinna og ráðstevnuvinna skal mennast í kommununi.
- Vit skulu tryggja eitt trygt og ríkt býar- og náttarlív fyri fólk, ungdóm, matstovur, skeinkistøð, mentanarlív, undirhald og náttar- og dansistøð.

- Tórshavnar havn er sjóvegis portrið millum kommununa og umheimin. Virksemið og útbyggingar í Tórshavnar havn skulu skipast við umhvørvi, trygd og menning fyri eyga.

# Náttúra og umhvørvi

Tórshavnar kommuna skal hava náttúruatlit og tryggja eina góða og livandi bygda- og býarnáttúru við grønum og bláum økjum tætt at borgarunum.

Vit vilja hava meira náttúru í nærumhvørvinum og tætt at borgaranum. Náttúra er góð fyri okkum menniskju og lívmargfeldið.

## Raðfestingar

- Ítøkilig ætlan skal gerast fyri varðveiting av náttúruøkjum í kommununi, sum fólkið kann fáa gleðið av.

- Vit skulu tryggja, at fjøran, áirnar og havumhvørvið er reint, so svimjast kann í sjónum og at spælast í fjøruni.

- Sandagerð skal reinsast.

- Kloakkútrensl skulu flytast út á streymasjógv.

- Áir og vøtn skulu virðast og varðveitast, soleiðis at hesi framhaldandi vera okkum og náttúruni til gleði.

- Árinskanningar á lívfrøðiliga margfeldið skulu fremjast og lýsast, áðrenn náttúruinntriv verða framd.

- Kloakkirnar í allari kommununi skulu setast í stand, og vatnið skal í mestan mun reinsast, áðrenn tað verður leitt út á streymasjógv.

- Fleiri grasfløtur og vegjaðarar skulu fáa frið, soleiðis at villar blómur og smákykt fáa bestu umstøður. Garðaskøran og aðrar innræsnar plantur skulu takast burtur í samstarvi við borgarum.

- Lendisgøturnar og gøturnar millum býlingar skulu støðugt útbyggjast.

# Lætt
# at velja grønt

Tórshavnar kommuna skal stuðla grøna orkuskiftinum. Ein týdningarmikil liður í hesum er at gera tað lætt og ómakaleyst hjá borgarum at velja grønu loysnina, so sum at ferðast við bussi og á súkklu, at skilja burturkast og at leggja um til varandi orkukeldur, umframt aðrar loysnir. Nógvu góðu átøkini í kommunala orkupolitikkinum skulu setast í verk.

## Raðfestingar

- Sólorka skal setast á kommunalar bygningar.
- Heita keldan í Kollafirði gagnnýtast til upphitan av bygningum.
- Bussleiðin skal útbyggjast og gerast betri við fleiri túrum um kvøldarnar, í vikuskiftum og til smáplássini. Allir bussar skulu leggjast um til grøna orku.
- Bilferðslan í miðbýnum skal umskipast og minkast fyri at bøta um trivnaðin og
- tryggleikan.
- Kommunan skal útvega fleiri skjótar løðistøðir til el-bilar í allari kommununi.
- Ruskskiljingin skal gerast betri, og endurnýtsla skal setast í verk. Tað skal vera lætt og ómakaleyst hjá vinnu og borgarum at skilja rusk.
- Ein innandura skiljihøll skal byggjast, samstundis sum fyrireikingin til felags brennistøð skal takast uppaftur.
- Ruskbilar skulu vera grønir.
- Leistur skal finnast til kompost av matleivdum, soleiðis at tilfeingið kann koma okkum til góðar, tí áleið helmingurin av øllum húsarhaldsburturkasti er matleivdir.
- Kommunal øki skulu leggjast út til býarfesti og felagsveltur.

# Økispolitikkur

Ein langtíðarætlan skal gerast fyri bygdirnar hvør sær í kommununi, sum raðfestir bygdirnar og trivnaðin har.

## Raðfestingar

- Tað skal vera møguligt at selja grundstykkir á bygd fyri annan prís.
- Staðbundnu nevndirnar skulu hava størri samsýning fyri teirra arbeiði.
- Ókeypis sigling við Strandferðsluni skal veitast til nólsoyingar og hestfólk.

# Atkomumøguleikar hjá øllum íbúgvum

Tórshavnar kommuna skal vera millum mest atkomiligu høvuðsstaðirnar í heiminum.

## Raðfestingar

- Allir bygningar, gongubreytir, trappur, spælipláss og kommunal tilboð skulu skapa atkomiligheit hjá fólki við serligum tørvi og rørsluavbjóðingum.
- Sjónveik og hoyriveik skulu hava somu atgongd at virka í gerandisdegnum og brúka allar hentleikar í kommununi.
- Atkoma, í breiðari merking, skal tryggjast øllum borgarum í kommununi.
- Børn við serligum kropsligum og sálarligu avbjóðingum og sum brúka hjálpitól skulu á spæliplássum hava tilboð og amboð at spæla og menna seg.

# Integrasjón og rættindi hjá øllum fólki

Tórshavnar kommuna skal vera fyri allar borgarar, eisini tey, ið hava annan uppruna enn føroyskan.

## Raðfestingar

- Rættindi hjá tilflytarum og stuðul til málsliga menning og sosiala integrasjón skulu gerast munandi betri.
- Verulig tilboð um at læra føroyska málið skulu veitast til øll børn, ið flyta til kommununa – bæði á dagstovnum, í fólkaskúlanum og í frítíðarskúlum.

# Trygg ferðsla og parkeringsviðurskifti

Trygg ferðsla, góðar umstøður at ganga, súkkla og nýta hjálpitól, sum eitt nú koyristólar, eru alneyðug fyri at menna trivnaðin og trygdina í kommununi. At loysa parkeringsviðurskiftini, og útbyggja okkara góðu ókeypis bussleið til tørvin hjá fólki, eru somuleiðis avgerandi mál fyri fólkið í kommununi. Týðandi ábøtur krevjast m.a. á vegir í bygdunum í kommununi.

## Raðfestingar

- Viðlíkahaldið av vegum í bý og bygd skal raðfestast. Innkomuvegirnir skulu gerast tryggir hjá fólki og ferðandi
- Atlit skal takast til bussar, tá ið vegir verða gjørdir/dagførdir í kommununi.
- Parkeringstunnil skal loysa parkeringstrupulleikan í miðbýnum.
- Tað skal gerast nógv tryggari at ferðast á súkklu, til gongu og við hjálpitólum í kommununi.
- Ætlan gerast fyri at bøta um ábæru ferðsluna millum annað við at økja um talið av góðum súkkluleiðum.
- Gongutunlar skulu gerast undir høvuðsvegir.

# Sløkkiliðið

Sløkkiútgerðin á bý og bygd skal dagførast. Harumframt skulu pengar setast av, so at pumpubrunnar verða kannaðir á hvørjum ári.